Tryggingareftirlitið

**Tórshavn 19. juni 2017**
Journalnr.: 17/00106-3

**Hoyringarskriv**

**Uppskot til kunngerð um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og tryggingarhaldfelagsskapum**

Tryggingareftirlitið sendir við hesum *Uppskot til kunngerð um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og tryggingarhaldfelagsskapum* til hoyringar, sí viðhefta fylgiskjal.

Uppskotið til kunngerð kemur í staðin fyri *kunngerð nr. 2 frá 30. september 2009 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum, sum seinast broytt við kunngerð nr. 2 frá 21. mai 2013.*

Galdandi kunngerð um ársfrásagnir tekur útgangsstøði *Finanstilsynets bekendtgørelse nr. 1266 af 26/10/2007 om finansielle rapporter for forsikringsselskaber og tværgående pensionskasser.*

Uppskotið til nýggja kunngerð um ársfrásagnir tekur útgangsstøði í *Finanstilsynets bekendtgørelse nr. 937 af 27/07/2015 om finansielle rapporter for forsikringsselskaber og tværgående pensionskasser, som ændret ved bekendtgørelse nr. 688 af 01/06/2016.*

Endamálið við uppskotinum er bæði at dagføra galdandi kunngerð um ársfrásagnir sum heild, og at tillaga kunngerðina til nýggju solvenskunngerðini, sum ætlandi eisini kemur í gildi 1. januar 2018.

Uppskotið til nýggja solvenskunngerð er gjørt í samráði við aktuararnar hjá feløgunum, og í framhaldi av hesum samstarvi hevur Tryggingareftirlitið havt fund við aktuararnar um ætlaðu broytingarnar í kunngerðini um árfrásagnir, serliga um tryggingarligar avsetingar og aðrar broytingar, sum eru viðkomandi fyri arbeiðið hjá aktuarunum, og sum kunnu hava við sær kt- og aðrar avbjóðingar.

Í arbeiðinum at evna til uppskotið til nýggja kunngerð um ársfrásagnir, hevur Tryggingareftirlitið nýtt sakkøna hjálp frá Ernst & Young, sum í viðfestum fylgiskjali hevur flokkað ymsu broytingarnar í mun til, hvar hesar stava frá, t.d.frá tillagingum til:

- Ársroknskaparlógina,
- IFRS,
- Solvens ll,
- o.a.

Í nevnda fylgiskjali er eisini ein meting av, í hvønn mun broytingarnar í donsku kunngerðin verða mettar viðkomandi fyri føroysku feløgini, og hvørjar tillagingar eru gjørdar.

Í uppskotinum til nýggja kunngerð um ársfrásagnir síggjast broytingarnar í mun til verandi kunngerð, og Tryggingareftirlitið hevur eisini sett inn fleiri upplýsandi viðmerkingar.

Nýggja kunngerðin um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og tryggingarhaldfelagsskapum verður eftir ætlan sett í gildi 1. januar 2018.

Møguligar viðmerkingar til uppskotið skulu vera Tryggingareftirlitinum í hendi í seinasta lagi 11. september 2017.

Insurance Authority, Skálatrøð 20, P. O. Box 73, FO 110 Tórshavn, Tel +298 35 60 20, Fax +298 35 60 35, www.tryggingareftirlitid.fo

Viðmerkingar og spurningar kunnu sendast við telduposti til gn@tryggingareftirlitid.fo ella til Tryggingar-eftirlitið stílað til Gudmundur E. Nónstein, Skálatrøð 20, Postboks 73, FO-110 Tórshavn.

Vinarliga

Jógvan Thomsen

Stjóri

/Gudmundur Effersøe Nónstein